Í Løgtingslóg nr. 39, frá 13 mai 2013 um semingsstovn, er ásett í § 7, "Partarnir hava skyldu at áseta sínámillum reglur í áhugatrætum, herundir í minsta lagi fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi."

Millum feløgini

**Føroya Skipara- og Navigatørfelagið**

og

**Føroya Reiðarafelag**

er 15. juli 2015 gjørd fylgjandi avtala.

1. Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingunum niðanfyri.
2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal verða skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum. Roknað verður altíð frá á midnátt.
3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.
4. Arbeiðssteðgur kann ikki fráboðast, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki fráboðast, fyrr enn samráðingarnar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er Semingsstovnurin komin uppí, ella er Semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsmaðurin er givin við semingsroyndum sínum.
5. Hendan avtalan kann sigast upp saman við uppsøgnini av sáttmálanum partarnar millum, við somu freist og fráboðan. Tó kann hendan avtalan bert ógildast við nýggjari avtalu.
6. Hendan avtalan fær gildi 15. juli 2015.

Tórshavn 15. Juli 2015

***<u>Føroya Skipara- og Navigatørfelag</u>***

Annfinnur Garðalíð, formaður

***<u>Føroya Reiðarafelag</u>***

Herálvur Joensen, stjóri